

# Marknaðarføring av Føroyum av bakkastokki í London

**Jan Müller**

28.11.2013 - 13:05

Oljan.fo

Mikukvøldið var fyrsta veruliga stigið tikið til miðvíst at marknaðarføra føroyska landgrunnin til oljuleiting, eftir at landsstýrismaður í oljumálum herfyri legði fram eina nýggja strategi fyri at fáa fleiri oljufeløg áhugað í oljuleitingini við Føroyar.

Hetta hendi, tá føroyska sendistovan í London og Vinnumálaráðið skipaðu fyri einum kunnandi tiltaki á donsku sendistovuni í London. Og sigast má at henda nýggja byrjanin at marknaðarføra landgrunnin varð væl móttikin í altjóða oljuverðini. Umleið 100 umboð fyri oljufeløg, fíggingarstovnar, sendistovur og fjølmiðlar umframt umboð úr Føroyum møttu til móttøkuna, har Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum og Tim Dodson, varaforseti í Statoil og stjóri fyri altjóða leiting høvdu orðið.

Tað var á oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum seinasta summar, at Johan Dahl legði fram eina nýggja strategi hjá myndugleikunum at marknaðarføra Føroyar sum leitiøki.

Tiltakið í London er so partur av hesi marknaðarføring og eftir uppmøtingini at døma, kann sigast, at Føroyar og oljuleiting hava stóran áhuga í bretska høvuðsstaðnum, har flestu av oljufeløgunum í heiminum búleikast.

Johan Dahl greiddi frá ungu føroysku leitisøguni, sum bert er 13 ára gomul. Hann vísti á, at higartil eru boraðir 7 brunnar og verða tveir brunnar boraðir komandi ár. Hann helt fyri, at góðir møguleikar eru fyri at gera fund við Føroyar og visti á, at føroyskir myndugleikar leggja seg eftir at skapa góðar karmar kring oljuleitingina. Sjálvur vónaði hann, fleiri oljufeløg fóru at vísa føroysku undirgrundini ans komandi árini og fegnaðist um, at Statoil saman við øðrum feløgum fer at bora í 2014.

Tim Dodson, altjóða leitistjóri hjá Statoil greiddi frá hepnu gongdini við leiting hjá Statoil hesi seinastu árini, har felagið hevur gjørt fleiri stór olju- og gassfund. Hann legði dent á týdning at hava dirvi til at royna nýggja leiðir, har váðin sjálvandi er stórur men har vinningurin afturfyri kann vera sera høgur. Dømi um slíkar leiðir, har Statoil hevur funnið olju og gass, eru Barentshavið, Norðsjógvurin, leiðin eystan fyri Brasilia, leiðirnar bæði vestan og eystan fyri Afrika og leiðirnar út fyri Kanada.

Tim Dodson, sum telist millum heimsins bestu leitistjórar, greiddi eisini frá komandi boringum í Føroyum, har Statoil stendur fyri at bora tveir brunnar saman við øðrum oljufeløgum. Hann vísti á, at eisini Føroyar eru eitt øki, sum kemur undir strategiina hjá Statoil, nevniliga at leita í økjum við høgum váða og við møguleika fyri stórum vinningi.

Sí røðuna hjá Johan Dahl niðanfyri:

Distinguished Members' of Parliament, Your Excellencies, Ladies and Gentlemen,

I would like to begin by welcoming you all to this event.

It is an honour for me to be here tonight and I am pleased that so many have accepted our invitation. I know you all have a very busy schedule but I hope you will find it an evening well spent.

I would like to thank especially HE Ambassador Grube for hosting this evening's event and also thank you to Mr Tim Dodson from Statoil for agreeing to give us his presentation.

Now I would like to give you a brief introduction to current exploration activities in the Faroes as well as what we expect in the near future.
Exploration in the Faroes is still in the early stages, the first licenses were granted in 2000 and the first wells drilled in 2001. Much has happen during the course of these 12-13 years, taking us several steps further. This is undoubtedly due to the substantial efforts

Licensees have channelled into the Faroese area.
Seven wells have been drilled. Additionally, one well, Brugdan ll, was suspended in 2012 and will be re-entered in 2014. Next year another well will be drilled in the licence area adjacent to the Rosebank-Lochnagar area on the UK side of the border.
Over the years a substantial amount of data have been acquired and analysed. Several research projects have been undertaken. Moreover drilling techniques in relation to basalt have also improved.
The results from these activities have taken us far but much still remains to be explored and we believe there is a great deal of potential.

We are striving for the activity level to increase and we are confident that the future will bring us to where we want to be.

To illustrate this let me draw to your attention to some points of importance.

Firstly, the fact that an active hydrocarbon system has been found is very encouraging.
Secondly, the interest for the Faroese Continental Shelf is fairly good:
- We regularly receive requests for data that have passed the confidential period.
- With respect to license holders we also see activity – New licence holders have entered, existing licence holders have increased their interests and new licenses have been granted.

Thirdly we are confident there is a basis for more activity. Therefore, our strategy involves the commencement of marketing efforts over the next few years. In other words, we will be promoting exploration of the Faroese continental shelf. The internal activity of our directorate will focus more on maturing prospects. Additionally, we will be present at conferences and be in contact with companies who we believe are potential licensees.

To support our plans of increased activity, we have undertaken a revision of the scheme called SINDRI. SINDRI is a scheme which undertakes research projects of relevance for future exploration on the Faroese Continental Shelf. It is a part of the license commitments and funded by the licence holders.
The scheme is now being revised in order to ensure that the focus is kept on the most relevant issues to move the exploration forward on the Faroese continental shelf.

In 2010 the Act on Hydrocarbon Activities was amended to make the application procedure more flexible. We adopted the Open Door policy, providing the option to apply for a license at any time.

Lastly without going into detail, I would like to draw to your attention two further advantages; our competitive fiscal regime for licence holders and the development of the infrastructure in the region of the Faroese Continental Shelf which we believe adds to the attraction of oil and gas exploration in the Faroes.

With the hydrocarbon potential and the activities I have touched upon, we feel confident

that there will be an increased exploration activity on the Faroese Continental Shelf in the years to come.

Distinguished Members’ of Parliament, Your Excellencies, Ladies and Gentlemen,

Myndirnar eru frá móttøkuni í London í gjár.
Myndatøka: Jan Müller/oljan.fo










